


## ... siglingin hjá Tjaldrinum og Brimli verður ógvuliga avmarkað restina av hesum árinum...

JÓHAN SIMONSEN

### SPARING

*– Tað er greitt, at tá okkum vantar pening til rakstur, er tað samstundis ein trupulleiki fyri fiskiveiðieftirlitið á havleiðunum, sigur Jóhan Simonsen, fulltrúi*

sum vantandi fíggjarliga rásarúmið hjá Fiskiveiðieftirlitinum gongur útyvir.

Fulltrúin sigur, at siglingin hjá Tjaldrinum og Brimli verður ógvuliga avmarkað restina av hesum árinum, men hann endurtekur og leggur dent á, at annað skipið altíð liggur klárt til bráfeingis uppgávur, sum kunnu stinga seg upp, um okkurt verður áfatt úti á havleiðunum.

– Vit noyðast at ansa eftir, at ikki verður siglt óneyðugt. Tað er greitt, at tá okkum vantar pening til rakstur, er tað samstundis ein trupulleiki fyri fiskiveiðieftirlitið á havleiðunum, sigur Jóhan Simonsen á Fiskiveiðieftirlitinum.

### Ikki plástur

Spurdur um eftirlitið, sum stovnurin í seinastuni hevur gjørt á landingarmiðstøðum kring landið fyri at finna út av, hvussu viðurskiftini eru við veiði av smáfiski, er ein "konpensatión" fyri vantandi eftirlit úti á havinum, sigur hann, at so er ikki.

– Tað eru ikki tey somu fólkini, ið arbeiða umborð á skipunum, sum taka sær av eftirlitsuppgávum uppi á landi, sigur fulltrúin.

*vilmund@sosialurin.fo*

við partrolarunum, tá talan hevur verið um smáan upsa, men tað vísir seg, at útróðrarbátar og línuskip ikki hava verið líka skjót at boða frá, sigur hann.

Upsin er ikki smáur, sum hann var fyri nøkrum árum síðan, og tí eru trupulleikarnir ikki so stórir her í løtuni.

– Men útróðrarbátar og línuskip hava somu fráboðanarskyldu sum partrolarar, tá ov nógvur smáfiskur er uppi í veiðini. Hesi før skulu boða frá eftir hvørja setu, um trupulleikar eru.

Jóhan Simonsen sigur, at markið fyri, hvussu nógvur ungfiskur kann verða uppi í veiðini, er 30%, men støddarmátini eru ymisk – alt eftir, hvørji fiskasløg talan er um.

Fulltrúin vísir á, at tað ikki er óhugsandi, at Fiskiveiðieftirlitið fer at steingja ávísar leiðir fyri veiði, og eftirlitið kann steingja leiðir heilt í land, um hildið verður, at tað er neyðugt til tess at verja ungfisk.

– Vit stongdu soleiðis herfyri eina leið eystur úr Svínoynni, sum gekk mest sum heilt inn klettin á Skorini, leggur hann aftrat.

At enda sigur Jóhan Simonsen, at kemur Fiskiveiðieftirlitið fram á veiði, sum hevur nógvan smáfisk, kann hetta gerast kostnaðarmikið fyri fiskiførini.

– Í flestu førum kann talan gerast um brot á fráboðanarskylduna, og tí vil eg mæla útróðrarbátum og línubátum til at halda galdandi reglur, sigur Jóhan Simonsen.

*vilmund@sosialurin.fo*

